# Smáir »havets herskere« á Nólsoyarvík

SUMMAR
*Vilmund Jacobsen*

Síðsta leygardag var jarðarferð í Nólsoy, tá ið 81 ára gamli, Hans Andrias Jacobsen, vanliga nevndur Hanni, varð borin til gravar. Ein kempa av einum manni, sum sigldi undir øllum krígnum. Serstakliga nærlagdur til sjógvin sum útróðrarmaður og vitandi um alt, sum er at vita um fiskimið, streym, veður og vind. Fyri nøkrum árum síðan gav hann út eina miðabók saman við stuttsøgum um hendingar á sjónum.

Í stovuni í heiminum hjá Hanna og konuni, Onnu, haðani Hanni varð borin út, stóðu nakrar bøkur á hillunum. Beint yvir høvdinum, har eg stóð yvirav kistuni hjá Hanna, stóð ein røð av bókum, sum allar vóru eins. Tann eina kallaðist »Havets Herskere«, og eg legði til merkis, at hetta var einasta bókin í røðini, har eitt bókamerki stakk upp ímillum blaðsíðurnar. Kanska ikki so undarligt, hugsaði eg, tá ið presturin, Bjarni Bæk, í kirkjuni segði okkum, at Hanne sigldi øll stríðsárini.

Kendi Hanna sum abbabeiggja mín og minnist aftur á dagar, har hann kom aftur við báti sínum, »Hemaranum«, við stórum og góðum toski, meðan avbygdamenn sama dag løgdu at landi við fiski, sum næstan ikki var avreiðingarførur – so smáur, hann var. Hetta var í eini tíð, tá ið lítil og eingin útróðrarfiskur fekst. Kortini visti Hanni, hvar hann kundi fáa nakrar góðar fiskar.

Tann eina dagin hevði Hanni 700 pund av stórum toski, og afturkomin segði hann, at hevði ein ungur maður verið á bátinum, hevði hann drigið mangt slíkt, tí sjálvur var hann so lamin í ørmunum. Minnist, at hendan dagin ynskti eg mær at verið við honum.



*Ein góðveðursdagur í Nólsoy. Smádreingirnir stuttleika sær í lítlum gummibáti innanfyri allan streym - og allar vandar, um teir vóru í bjargingarvesti*

**Smáir »havest herskere«**

Leygardagurin var ein góður dagur.

Afturkomin umborð á Rituna eftir jarðarferðina hjá Hanna, sóu vit hesar fittu smádreingirnar hugna sær í einum lítlum gummibáti á Nólsoyarvík. Teir damlaðu aftur og fram, innari og ytri. Tankarnir mólu aftur á barnaárini, tá ið næstan hvør smádrongur í bygdini átti flaka. Tað var illa dámt av abba, beiggja Hanna, tá ið farið varð út á streym, og ikki so sjáldan stóð gamli niðri við sjóvarmálan og rópti okkum innaftur. Flakarnir vóru mangan stórir og lógu tungir í sjónum. Hart rekur fram við fjøruni, tá ið tú kemur norðurfyri bygdina, og skjótt kann vera, at smádrongurin ikki orkar at stríðast móti streyminum. Kemur ótti á, er vandi á ferð.

Onkur reyðfiskur ella brondingur er drigin uppí flakan undir húsunum hjá Hanna í sínari tíð.

Smádreingirnir, vit síggja á myndini, vóru ikki í bjargingarvesti, og tað sá ikki so vandaleyst út, men blikalogn var, og teir vóru innanfyri allan streym.

Ein hugnalig løta í Nólsoy, har tú sleit tínar barnaskógvar.

Við Hanna er seinasti abbabeiggin borin til hvíldar og flag lagt omanyvir ein hóp av vitan um tey loyndarmál, sum náttúran goymir – og bert tey gomlu vistu um at siga.

# Hetta er sum at búgva á útoyggj

**– Ferðasambandið hjá okkum, sum búgva á Nesi, er alt ov vánaligt, sigur 79 ára gamli, Hans Jakku á Gadd**

SAMFERÐSLA
*Vilmund Jacobsen*

79 ára gamli, Hans Jakku á Gadd, sum saman við konuni, Onnu, býr á Nesi, harmast um, at Bygdaleiðir hava skert koyringina út á Nes og av Nesi.

– Vit høvdu sjey túrar út á Nes um dagin, men nú eru bert tríggir túrar eftir – og bara ein fyrrapart, sum ikki hongur saman við siglingini hjá gomlu Ternu. Bygdaleiðir koyra av Nesi klokkan 9.25, men Ternan siglir av Toftum klokkan 8.50.

Hans Jakku vísir á, at ein bussur fer av Toftum ávegis til Havnar klokkan 9.20 – ella 5 minuttir áðrenn, bussurin fer av Nesi.

– Skulu eg og konan, sum eru einsamøll í húsi, til Havnar við Ternuni um morgunin, noyðast vit at biðja onkran koyra okkum á bátin. Tað er ikki altíð so lætt, tí dóttir okkara býr í Havn. Øll eru til arbeiðis og, sum rímiligt er, hava tey nóg mikið um oyruni, sigur Hans Jakku.



*– At búgva úti á Nesi, er næstan sum at búgva á útoyggj. Koyringin hjá Bygdaleiðum er skerd við fýra túrum um dagin og teir, ið eftir eru, passa illa til farleiðina til Havnar, sigur 79 ára gamli, Hans Jakku á Gadd*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

Seinnapartin um dagin koyra Bygdaleiðir tvær ferðir av Nesi, men heldur ikki hesir túrarnir passa serliga væl til Ternuna ella leið 400, sum koyrir til Havnar.

– Einasti túrur, sum passar rímiliga væl, er túrurin av Nesi klokkan 16; tá fer ein bussur av Toftum ávegis til Havnar klokkan 16.20, sigur Hans Jakku.

Hann vísir á, at tá ið Ternan kemur úr Havn, er eingin túrur út á Nes.

– Men tað hevur tað heldur ongantíð verið, leggur hann aftrat.

**Sum á útoyggj**

79 ára gamli, Hans Jakku, sum fylgir væl við tí, sum fyrigongur í samfelagnum – og ikki minst á politiska vígvøllinum – undrar seg yvir, at myndugleikarnir fremja slíkar skerjingar, nú so nógv verður tosað um útjaðaran.

– Eg haldi ikki, at Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, hevur hugsað um útjaðarapolitikk, tá ið stovnurin, hann umsitur, hevur skert okkara møguleikar so nógv. At skerja koyringina av Nesi úr sjey túrum niður í tríggjar um dagin, er avgjørt ikki útjaðarapolitikkur, sigur hann.

Hans Jakku á Gadd vónar, at myndugleikarnir vilja skipa so fyri, at fólk á Nesi fáa fleiri ferðamøguleikar, og at koyringin hjá Bygdaleiðum verður betur løgd til rættis, soleiðis at túrarnir passa betur til Ternuna, sum siglir av Toftum og koyringina til Havnar. Somuleiðis ynskir hann, at tað fer at gerast møguligt at sleppa útaftur á Nes, tá ið Ternan kemur úr Havn um dagarnar.



Búskapur og vinna:

## Danmark ágóða av fótbólti

Tey góðu úrslitini hjá danska fótbóltslandsliðnum í HM-kappingini hava ikki bert ítróttarligan týdning fyri Danmark. Í danska ídnaðarfelagnum verður sagt, at tá Danmark var í HM í Meksiko, vísti tað seg, at áhugin fyri donskum vørum vaks nógv ymsastaðni kring heimin.

Jørgen M. Hansen, stjóri í ídnaðarfelagnum heldur, at tað hevði kostað ídnaðinum nakrar hundrað milliónir krónur í marknaðarføring fyri at fingið tað sama burturúr, sum fótbóltslandsliðið gav ídnaðinum í ókeypis marknaðarføring.

Jørgen M. Hansen sigur, at tað er ov tíðliga at siga enn, hvønn ágóða danski útflutningurin fær burtur úr HM-kappingini hesaferð. Hann ivast ikki í, at sigurin á Fraklandi fer at gera mun, men heldur, at skal fótbólturin veruliga gagna vinnuni, má Danmark koma uppaftur longur í kappingini.

## Færri fartelefonir

Finska Nokia væntar at selja heldur færri fartelefonir í hesum ársfjórðinginum enn í seinasta ársfjórðingi. Upprunaliga hevði fyritøkan væntað at selja heldur fleiri fartelefonir í apríl-ársfjórðingi, men nú verður sagt, at sølan helst verður millum trý og seks prosent minni. Tað merkir, at umleið 38 prosent av øllum nýggjum fartelefonum eru frá Nokia.

## Nógv frítíðarløn

Norðmenn hava ongantíð fingið so nógv útgoldið í frítíðarløn sum í ár. Sambært hagstovuni fáa norsku arbeiðstakararnir í meðal 31.500 krónur útgoldnar, og tað er 14 prosent meiri enn í fjør. Tilsamans fáa norðmenn 82 milliardir krónur útgoldnar í frítíðarløn í ár. Sambært hagstovuni fara næstan 80 prosent av pengunum til frítíðarferðir í summar.

UTTAN ÚR HEIMI

# USA fer at forða kríggi um Kashmir



*Donald Rumsfeld hitti fyrst indiska verjumálaráðharran George Fernandes. Í dag fer Rumsfeld til Pakistan*

*Mynd: Reuters*

**Amerikanski verjumálaráðharrin vitjar íhesum døgum India og Pakistan, har hann roynir semju**

KASHMIR-STRÍÐIÐ
*Árni Joensen*

Amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, kom týskvøldið til indiska høvuðsstaðin New Dehli at tosa við indisku stjórnina um Kashmirkreppuna. Í gjár hitti hann Atal Behari Vajpayee, forsætisráðharra og aðrar indiskar politikarar.

Áðrenn hann fór til India, segði Rumsfeld, at viðurskiftini millum India og Pakistan eru batnað nakað seinastu dagarnar. Hann vísti á, at India hevur sagt seg vera til reiðar at tosa um kreppuna, og at fimm indisk herskip, sum hava ligið úti fyri pakistansku strondini, eru farin haðani. Rumsfeld helt, at nú er tað Pakistan, sum eigur at vísa, at tað eisini er hugað fyri friði. Hann segði seg tó fegnast um, at pakistanska stjórnin hevur lovað at forða muslimsku uppreistrarmonnunum at gera álop inn um indiska markið í Kashmir.

Pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, segði við bretska útvarpið BBC í gjár, at India hevur tikið nøkur stig tann rætta vegin, men at nakað restar í enn. Í dag skal Musharaf so tosa við Donald Rumsfeld, sum kemur úr New Dehli til Islamabad í dag.

# Ætlaðu at stoyta eitt flogfar inn í Big Ben

**Limir í felagsskapinum al-Qaeda vóru í Heathrow-floghavnini í London tann 11. september í fjør. Ætlanin var at ræna eitt flogfar og at renna tað inn í Big Ben í London**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*

Rohan Gunaratna, sum er serfrøðingur í yvirgangsvirksemi, og sum starvast á lærda háskúlanum St. Andrews í Skotlandi, vil vera við, at al-Qaeda ætlaði at ræna eitt flogfar í Bretlandi og at renna tað inn í tað kenda Big Ben í London. Atsóknin skuldi gerast sama dag sum atsóknirnar í New York og Washington tann 11. september í fjør.

Rohan Gunaratna segði við amerikanska sjónvarpið CNN, at málið við atsóknini í London var at vísa, at al-Qaeda var ført fyri at søkja at málum kring allan heimin. Men atsóknin varð av ongum, tí trygdarmyndugleikarnir í Heathrowfloghavnini steðgaðu allari flogferðsluni aftan á atsóknirnar í USA.

Rohan Gunaratna sigur, at upplýsingarnar um ta ætlaðu atsóknina í London eru frá einum manni, sum varð tikin í India í sambandi við atsóknina at indiska tjóðartinginum í desember í fjør. Maðurin hevur gingið á flogskipaskúla í USA, Bretlandi og Avstralia, og sambært Gunaratna fekk hann pengar frá al-Qaeda til at skipa fyri atsóknini í London. Undir avhoyringum skal maðurin hava greitt frá, hvat flogfar ætlanin var at ræna.

Rohan Gunaratna hevur skrivað eina bók um al-Qaeda. Nógvar av upplýsingunum í bókini eru úr loyniligum skjølum hjá bretsku myndugleikunum, sum høvundurin slapp at hyggja í, tá hann skrivaði bókina.

Svenski yvirgangsserfrøðingurin Magnus Ranstorp ivast ikki í, at upplýsingarnar hjá Rohan Gunaratna eru rættar. Hinvegin væntar hann, at bretsku myndugleikarnir fara at avsanna tær, tí talan er um sera loyniligar upplýsingar. Men ein tílík avsannan merkir ikki, at upplýsingarnar ikki eru rættar kortini, sigur Magnus Ranstorp.

Úr Norðurlondum:

## Rockarar gera um seg

Teir báðir stóru rockarafelagsskapirnir, Hells Angels og Bandidos, hava rættiliga gjørt um seg í Danmark í seinastuni. Løgreglan sigur, at teir seinastu mánaðarnar hava rockararnir útvegað sær 70 nýggj felagshús um alt landið, og at teir hava ongantíð verið umboðaðir í so nógvum donskum býum sum nú.

Í summum býum hava fólk valt at fara í hernað ímóti rockarunum. Í Køge sleppa rockararnir ikki inn í ølstovurnar, og aðrastaðni hava fólk tikið seg saman og keypt hús, sum rockararnir hava ætlað sær til felagshús. Í Jyllandi hava sjey býir tikið seg saman til at samskipa tiltøk ímóti rockarunum.

## Genta funnin

Tann 18 ára gamla niðurlendska gentan, sum hvarv við Geiranger í Noregi hósdagin í síðstu viku, varð funnin týskvøldið. Hon var deyð.

Norska løgreglan sigur, at Josephine Grubben varð funnin í brattlendi, og tí verður hildið, at hon hevur verið áhaldsin og er dottin oman. Løgreglumenn og bjargingarmenn hava leitað seinastu dagarnar, og tyrlur tóku eisini lut í leitingini. Foreldrini hjá gentuni komu til Noregs um vikuskiftið, og tey hava leitað saman við løgregluni.

Josephine Grubben var komin til Noregs at arbeiða sum hjálparfólk á einum gistingarhúsi í Geiranger í summar.

## Dynamitt stolið

Onkur hevur verið inni í einum handli í Trysil í Noregi og stolið 3500 stengur av dynamitt. Tað er ikki smávegis stuldur, tí sambært løgregluni viga stengurnar heili 350 kilo.

Løgreglan sigur, at dynamittið lá væl goymt aftan fyi tvær dyr, men at innbrotsmenninir kortini eru komni fram á tað. Sum er hevur løgreglan eingi spor at ganga eftir í málinum.